# Crawling Blue og 200 á Jóansøkufestival

**Jóansøkufestivalurin verður aftur partur av jóansøku á Tvøroyri í ár, og tvey tey fyrstu nøvnini verða kunngjørd í dag, nevniliga Crawling Blue og 200.**

JÓANSØKUFESTIVALUR
*dagfinn@sosialurin.fo*

Jóansøkufestivalurin er afturvendandi partur av jóansøkuni á Tvøroyri. Nú verður farið undir at kunngera luttakandi tónleikabólkarnar, og fyrstu nøvnini eru bæði úti við nýggjum fløgum, nevniliga Crawling Blue og 200.

Jóansøkan er skiftivís á Tvøroyri og í Vági. Í ár verður jóansøkan á Tvøroyri, og er Jóansøkufestivalurin partur av stevnuni. Hesaferð verður tónleikatiltakið skipað sum ein stuðulskonsert til frama fyri saltsiloina á Tvøroyri, ið ætlandi skal gerast stásiligt mentanarhús (sí grein aðrastaðni í blaðnum).

## Føroyskt og frammi

Tvey tey fyrstu nøvnini, ið Jóansøkufestivalurin hevur valt at kunngera, eru føroysk og frammi júst nú. Báðir bólkarnir hava júst givið fløgu út.

200 hava givið út fløgu, ið er trúgv mótvegis stílinum, ið er føroyskur punktónleikur, ið eisini prikar. Og júst hesi prik til landsins kosnu fólk, hava fingið hesi at gera vart við seg, og hava 200 sostatt fingið ikki so lítið av ókeypis lýsingartíð í bestu senditíð í loftmiðlunum.

Punkbólkurin hevur verið á ferð við tónleikinum frá fløguni, og 200 er avgjørt enn millum fremstu nøvnini, tá talan er um stór nøvn í føroyskum tónleiki í dag, sum veruliga hava funnið nakað serstakt og ein stíl, ið teir, og bert teir, standa fyri.

Crawling Blue er Føroya einasti bluesbólkur. Teir meina nakað við tað, ið teir fáast við, og á odda er Føroya Mr. Blues, Uni R. Debess.

Bólkurin hevur júst givið út fløgu, ið er væl hugsað ígjøgnum, væl spæld, og væl gjørd í allar mátar. Fleiri framleiðarar máttu til, innan Óli Poulsen at enda ljóðblandaði tónleikin soleiðis, at limirnir í bólkinum funnu tað, ið teir vildu hava. Og hetta ber boð um, at her er nakað meira, enn bert ein fløga. Her er ein fløga, ið tónleikararnir hava arbeitt við, og sum teir frammanundan vistu í sínum hugaheimi, hvussi skuldi taka seg út í hátalarunum.

Tvey sterk føroysk nøvn leggur Jóansøkufestivalurin út við, og komandi vikurnar verða fleiri nøvn kunngjørd, siga fyrireikararnir.



*200 og Crawling Blue eru fyrstu nøvnini, ið Jóansøkuufestivalurin avdúkar*
*(Mynd; Bjarni Nygaard)*

Starvslýsing

Meginskrivstovan

## Fíggjarfulltrúi/controllari

Eitt starv sum fíggjarfulltrúi/controllari í Nærverkinum verður hervið lýst leyst til setan skjótast tilber.

Talan er um eitt sjálvstøðugt starv í fakligum umhvørvi, har møguleiki er fyri at vera við til at menna fíggjarøkið í Nærverkinum.

Nærverkið er skipað við Meginskrivstovu og 4 tænastudeildum. Virksemið er skipað um alt landið. Tað starvast uml. 1400 fólk í Nærverkinum. Í løtuni rekur Nærverkið virksemi fyri uml. 500 mió. kr. árliga. Nærverkið er í støðugum vøkstri og stórar uppgávur liggja fyri framman innan øll okkara virkisøkir.

Nærverkið leggur dent á at hava eina miðvísa og javna tænastu innan teir karmar, politiska skipanin ásetur. Fíggjarstýring, játtanareftirlit og áhaldandi leiðslukunning hevur í hesum sambandi ein avgerðandi leiklut.

Vit hugsa okkum ein persón, ið dámar væl at arbeiða við tølum og dugir at samantvinna fíggjarliga tilfeingið við virksemið, ið fer fram í Nærverkinum. Hevur evni at skapa og framleiða vitan, ið kann nýtast sum grundarlag undir allari støðutakan og leiðslukunning. Hevur hegni til at skapa framtíðarloysnir og at seta hesar í verk, er sjálvstøðugur, hjálpsamur og hevur góð samstarvs- og samskiftisevnir.

**Vit leggja eisini dent á, at tú:**
- Hevur viðkomandi útbúgving, helst frá hægri lærustovni
- Hevur royndir innan fíggjarstýring
- Ert kønur í telduskipanum og dátugrunnum
- Hevur kunnleika til almenna fyrisiting
- Hevur málsligt hegni og dugir væl at orða teg skrivliga
- Ert álítandi og nærlagdur.

Starvið er skipað við tilvísing til leiðsluna fyri Búskapardeildina, ið er skipað sum tvørgangandi stápur á Megiskrivstovuni.

**Løn- og setanarviðurskifti**
Løn- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Setanarøkið fevnir um Nærverkið og tænastustaðurin í løtuni er Meginskrivstovan.
Meiri fæst at vita við at venda sær til Mary J. í Garði, stjóra, á tlf. 360000.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
FO-110 Tórshavn

Stílað: Mary J. í Garði, stjóri

**Umsóknarfreist: 11. mai 2009**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Fíggjarmálaráðið

Avloysarastarv
## Fulltrúi til Fíggjarmálaráðið

**Starvið**
Fyri fulltrúa í Fíggjarmálaráðnum ið skal í barsilsfarloyvi 01. juli 2009 og 7 mánaðir fram, verður søkt eftir avloysara.

Tú kemur at arbeiða við sera fjøllbroyttum uppgávum av ráðgevandi, fyrisitingarligum og analytiskum slagi á teimum økjum, ið ráðið umsitur. Dømir:
- Tú ráðgevir landsstýrismanninum um fíggjar-, skatta- og avgjaldsmál og viðgerð innkomin mál
- Tú fyrireikar uppskot til nýggjar lógir og lógarbroytingar
- Tú loysir tvørgangandi og samskipandi uppgávur
- Tú ger analysur og langtíðarætlanir
- Tú ráðgevir og leiðbeinir aðalráðum og stovnum
- Tú kemur at samstarva við Fíggjareftirlitið í Danmark

**Førleiki**
Vit rokna við, at tú hevur samfelagsvísundaliga útbúgving av hægri lærustovni, so sum cand.polit., cand. jur., cand.oecon. ella líknandi. Vit rokna eisini við, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva í arbeiðsbólkum.

Eisini kann talan verða um lesandi, sum ynskja ein steðg við lesnaðinum.
Vit bjóða
- Sjálvstøðugt starv
- Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har tú arbeiðir nógv saman við teimum politisku myndugleikunum
- Starvið er samstundis sera áhugavert við nógvum samskifti úteftir
- Flex-tíð

Arbeitt verður á høgum fakligum stigi, og tí eru sera góðir møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Setanartreytir**
Setanartreytir og løn eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanin fatar um alt Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini aðalráðini.

**Umsókn**
Umsókn saman við CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

***Fíggjarmálaráðið***
***Postboks 2039***
***FO-165 Argir***

Freistin at søkja er mánadagin 11. mei 2009 kl. 12.00.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmálastjóra, á tlf. 35 20 20.

Lýsingin finst eisini á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum: www.fmr.fo.
Telduposturin er fmr@fmr.fo

TRAÐAGØTA 39 · POSTSMOGA 2039 · FO-165 ARGIR · TEL: 35 20 20 · FAX: 35 20 25 · FMR@FMR.FO